# handVERKARIN

2012 BLAÐ NR. 43 HAVNAR HANDVERKARAFELAG




















## Í blaðnum hesa ferð:

síða

Oddagrein: Marknagilsdepilin . . . . . . . . . . s. 3
Størsta byggiætlan Føroya . . . . . . . . . . s. 4
Fyritøkur og Marknagilsdepilin . . . . . . . . . . s.8
Marknagilsdepilin: 475 milliónir fyri Marknagil, og hvat so? . . . . . . . . . . s. 9
Janus B. Kamban: Um Marknagilsdepilin . . . . . . . . . . s. 11
Søgan um tekniskar skúlar í Føroyum . . . . . . . . . . s. 15
Sjónarmið: Oskar Eirikson . . . . . . . . . . s. 19
Brot úr søgu felagsins . . . . . . . . . . s. 22
Frágreiðing frá vitjan av norska el & it forbundinum . . . . . . . . . . s. 29

**Útgevari:** Havnar Handverkarafelag · Stoffalág 60 · Box 203 · 110 Tórshavn
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Eli Brimsvík
**Blaðstjórn:** Media · **Umbróting, prent og liðugtgerð:** Føroyaprent
Havnar Handverkarafelag gevur Handverkaran út 4 ferðir um árið.
**Skrivstovutíð:** Mánadag til og við hósdag frá kl. 9 til 15.
Telefon 35 48 00 · fax: 35 48 01 · Teldupostur: handverk@handverk.fo · www.handverk.fo







### Eykaaðalfundur í eftirlønargrunninum:

Eftirlønargrunnurin hevur eykaaðalfundur mikukvøldið 10 oktober 2012 - kl. 19.00 í Handverksdeplinum í Stoffalág 60.

### Skrá:

Viðtøkubroytingar.
1. Samanseting av nevnd.
2. Limaskapur.?
3. Ymiskt.
Møti fjølment.
Nevndin.

Nú skiftirætturin hevur tikið fleiri fyritøkur til trotabúgvaviðgerð, vilja vit gera vart við, at tað er umráðandi, at limir okkara, sum møguliga hava starvast hjá hesum fyritøkum, og eiga løn/eftirløn til góðar, gera vart við seg sum skjótast.

Fráboðanarfreistin til trygdargrunnin er 4 vikur frá freistdegnum. Freistdagurin verður ásettur soleiðis:

Konkurs: Tann dagurin, ið skiftirætturin ásetur smb. konkurslógini.

Umsóknarskjal kann takast niður á heimasíðu okkara, www.handverk.fo ella á www.Taks.fo.

Umráðandi er, at umsóknin verður rætt útfylt.

Viðmerkingar til einstøku teigarnar í umsóknini eru at finna á heimasíðuni, og annars kann hjálp til at útfylla umsóknarskjalið fáast við at venda sær til skrivstovu felagsins.

Málarameistari
RANSIN N. DJURHUUS
TEL. 26 46 82

# STØRSTA BYGGIÆTLAN FØROYA



Spennandi verkætlanin við skúlabyggingini við Marknagil gongur framá – um ikki so skjótt framá, sum ein hevði ynskt.

Tilgongdin í sambandi við eina so stóra byggiverkætlan er drúgv, tí støða skal til nógvar og torgreiddar spurningar, áðrenn fari kann verða undir arbeiði.

Eftir at løgtingið á vári 2008 samtykti at fara undir ein nýggjan skúladepil, fór fyrireikingararbeiðið í gongd. Upprunaliga vóru tað bara Handilsskúlin og Tekniski Skúli, sum vóru fevndir av ætlanini, men seinni kom Studentaskúlin eisini uppí.

Ein bygginevnd, sum millum annað var mannað við umboðum fyri skúlarnar, Mentamálaráðið og Landsverk, varð sett at gera eina byggiskrá.

Úrslitið av hesum arbeiði gjørdist, at 5 arkitektafyritøkur vórðu bjóðaðar at koma við uppskotum til byggingina. Av hesum vórðu tvær valdar út til at gera endaligt uppskot.

## Spennandi arkitekturur

Ein dómsnevnd varð sett at velja tað endaliga arkitekstuppskotið, og valið fall á uppskotið hjá kendu donsku arkitektafyritøkuna, Bjarke Ingels Group (BIG). Uppskotið varð gjørt í samstarvið føroysku arkitektarnar, Fuglark.

Sum myndirnar vísa, er talan um spennandi arkitektur við rundum høvuðsbygningi og 5 fýrkantaðum ørmum, ið stinga út í hvør sína ætt.

Eftir at BIG hevur detailprojekterað alla verkætlanina, bjóðaði Landsverk sum byggiharri til undangóðkenning av fyritøkum, ið ynsktu at bjóða upp á eina ella fleiri av timum 8 stórarbeiðstøkunum, ið verkætlanin varð býtt upp í.

## Skúladepilin í tølum

Fermetrar: 19.400 fermetrar til støddar.

Mettur kostnaður: 391 mió. kr. umframt innbúgv o.a. umleið 60 mió. kr.

Pláss fyri umleið 1.300 næmingum.

Fer at hýsa teimum trimum miðnámsskúlunum í Havn: Handilsskúlanum, Tekniska skúla og Studentaskúlanum, sum koma at hava felags leiðslu.

Eftir veraandi fíggjarkarmi hjá Løgtinginum skuldi skúladepilin takast í nýtslu í 2016.

## Leisturin

Leisturin við at býta verkætlanina upp í stórarbeiðstøkur var valdur, tí tað bæði frá politiskari og vinnuligari síðu var eitt sterkt ynski um, at føroyskar fyritøkur skuldu hava javnbjóðis møguleika avið útlendsskar, ið sum heild eru møguleika, ið sum heild eru munandi størri enn tær føroysku. Slíkt gerst best við einum tílíkum leisti, tí tá hava eisini minni fyritøkur sum tær føroysku betri møguleika fyri at bjóða seg fram.

## Projektsjefur

Verkætlanin við Marknagil er sera stór og spennandi avbjóðing fyri Landsverk. Fleiri starvsfólk á stovninum hava luttikið og koma framvegis at luttaka í arbeiðinum við hesi stóru verkætlanini, sum Skúladepilin við Marknagil er. Eitt nú arkitektar, verkfrøðingar, byggifrøðingar, roknskaparfólk, kontrollari og kunningarfólk.



*53 ára gamli Heini Tróndur Hansen er settur sum projektsjefur, hann hevur drúgvar royndir við stórum verkætlanum.*

Eins og í sambandi við aðrar verkætlanir krevur hendan uppgávan neyva stýring frá byggiharrans síðu. Sum leiðara fyri tí starvsfólkatoyminum, ið framhaldandi kemur at arbeiða við Skáuladeplinum, hevur leiðslan sett ein projektsjef í starv. Talan er um 53 ára gamla Heina Trónd Hansen, ið hevur drúgvar roynd við stórum verkætlanum í Danmark.

Heini Trónd Hansen varð í 1985 útbúgvin

# STØRSTA BYGGIÆTLAN FØROYA

diplomverkfrøðingur á Horsens Teknikum í Danmark. Afturat hesum hevur hann millum annað útbúgvið seg í leiðslu, projektstýring, virkis- og samfelagsbúskapi, umframt í vinnulívsrætti.

Seinastu árini hevur Heini ognað sær drúgvar royndir sum bæði projektsjefur, projekt- og marknaðarsjefur, kalkulatiónssjefur og byggiharraráðgevi í størvum hjá millum annað NCC, Phil & Søn og síðan 2010 hjá Cowi í Århuus.

Í eitt tvey ára tíðarskeið arbeiddi hann eisini sum sjálvstøðugur ráðgevi. Heini Trónd Hansen, ið er ættaður úr Havn, tók við starvinum sum projektsjefur tann 1. apríl 2012.

## Organisera projektið

Heini Trónd Hansen greiður frá, at fyrsta uppgáva hansara verður at organisera projektið, soleiðis at Landsverk kann seta tað í verk. Verkætlanin er býtt upp í 8 stórarbeiðstøkur, og hjá mær snýr tað seg um – saman við lóggávuserfrøðingum og øðrum, um at fáa 8 entreprenørar og Landsverk sum byggiharra til at blíva samd, sigur Heini Trónd Hansen. Áðrenn hann kom til Føroya arbeiddi hann sum byggiharraráðgevi við tveimum parallellum verkætlanum í Danmark. Tað vóru verkætlanir, sum lógu um 200 mió. hvør. Sum bæði ráðgevi og entreprenørur havi eg arbeitt við bæði minni og størri projektum enn tað, greiðir hann frá. Heini hevur arbeitt í Danmark síðani 1993. Annars hevur hann eisini starvast í Føroyum m.a. hjá G. Waagstein gjøgnum síðstu helvt av 80'árunum og fyrsta part av 90'árunum. Men tað eru komnar fleiri útlendskar fyritøkur til Føroya síðani eg arbeiddi í Føroyum leggur hann afturat.



## Góðska og prísur

Spurdur hvør høvuðsuppgávan hjá einum projektsjefi í eini slíkari verkætlan er, greiðir hann frá, at mín primera uppgáva er at virka sum byggiharri. Eg skal bíleggja tað, sum skal til fyri at arbeiði koyrir. Tað snýr seg bæði um ráðgeving og arbeiðstøku, og eg skal fylgja verkætlanini heilt fram til at hon er liðug. Avbjóðingin í eini slíkari verkætlan er at fáa góðsku og prís at ganga upp í eina hægri eind og ikki minni at halda tíðarætlanina. Men nógv av tí er givið frammanundan, tá prosjektið er teknað. Men hetta er eitt spennandi og framskygt projekt. Man veit eisini, at har sum BIG (Bjarke Ingells Group) er við, verður ofta brotið upp úr nýggjum. Og hann leggur afturat, at BIG er ein væl dámd fyritøka í Danmark eins og í øðrum londum.
Sambært verkætlanini skal nógv av tí, sum byggjast skal burturúr innflytast, og helst verður tað ein stór kabala, sum skal ganga upp.






Framhald á s. 8

# FYRITØKUR OG MARKNAGILSDEPILIN

Landsverk hevur boðað frá, at samanlagt vóru 24 fyritøkur, sum bjóðaðu seg fram at standa fyri teimum ymisku stórarbeiðstøkunum.

21 fyritøkur vóru undangóðkendar, lagt verður aftrat, at tær 8 stórarbeiðstøkurnar eru hesar:

1. Jørð, kloakk, betong og stálarbeiði.
2. Innilokan.
3. Innrætting o.a.
4. El-arbeiði o.a.
5. HVS, luftskiftisskipanir o.a.
6. Múraraarbeiði o.a.
7. Málaraarbeiði o.a.
8. Lendisarbeiði o.a.

Samlaðu byggiútreiðslurnar fyri Marknagilsdeplin eru í verklagslógini ásettar til at vera í mesta lagi 391 miljónir krónur.

Tá er innbúgv og onnur útgerð, sum væntandi fer at liggja um 60 miljónir krónur, ikki íroknað.

Seinasta freist at lata inn tilboð var 28. august 2012, og sambært Landsverk vóru tey bíligastu tilboðini hesi: (avrundaðar upphæddir)

**1. TG Verk**
Jørð, kloakk, beton og stál: . 138,8 mió. kr.

**2. TG Verk**
Innilokan: . . . . . . . . . . . . . . 108,5 mió. kr.

**3. TG Verk**
Innrætting: . . . . . . . . . . . . . . 99,0 mió. kr.

**4. El Team Vest**
El arbeiði: . . . . . . . . . . . . . . . 35,0 mió. kr.

**5. Demich**
HVS, luftskipanir: . . . . . . . . . 62,6 mió. kr.

**6. TG Verk**
Múraraarbeiði: . . . . . . . . . . . 22,7 mió. kr.

**7. Anskar Hansen**
Málaraarbeiði:. . . . . . . . . . . . 0,9 mió. kr.

**8. Articon**
Lendisarbeiði:. . . . . . . . . . . . 8,0 mió. kr.









# MARKNAGILSDEPILIN: 475 MILLIÓNIR FYRI MARKNAGIL, OG HVAT SO?

Nú upprann so loksins løtan, har tilboðini uppá Marknagilsdepilin vóru latin upp.

Onkur er kanska skelkaður av, at 155 milliónir resta í fyri at gjøgnumføra verkætlanina, men eg rokni við, at heilt nógv ikki trúgva uppá, at verkætlanin kundi gjøgnumførðast fyri ta upphædd, sum var upplýst í verkslagslógini, nevniliga 391 milliónir uttan innbúgv og aðra útgerð.

Komandi tíðin kemur at vísa, um møguleiki er at spara, so samlaði kostnaðurin kann fáast munandi niður, uttan at skerja ætlanina nevnivert.

475 milliónir fyri Marknagilsdepilin, kann tykjast at vera nógvur peningur, men er tað nú so øgiligt, tá ið hugsa verður um aðrar gjøgnumførdar verkætlanir.

## 3 skúlar í einum

Vit skula minnast til, at her er talan um 3 skúlar í einum.

Hettar er eisini ein íløga í okkara ungdóm, sum ætlandi skal bera landið víðari framá. Tað hjálpir lítið at grenja um, at okkara ungdómur rímur av landinum, um vit ikki hava ráð til at hava nøktandi utbúgvingarumstøður at bjóða teimum.

## Aðrar verkætlanir: Hvussu nógv kostaði Miðnámsskúlin í Hovi?

Og hvussu nógv kostaðu ábøturnar, sum máttu gerast grunda á fuskarbeiði í Hovi?



*Havnar Handverkarafelag: Eli Brimsvík, formaður:*

Hvussu nógv kostaði Tekniski skúli í Klaksvík, við um- og útbyggingum, og játtanir sum man ikki visti, hvat skuldi brúkast til?

Skal ikki undra um onkur Norðoya politikari eisini kemur við uppskoti um at flyta maritimu útbúgvingarnar, og byggja nýggjan Vinnuháskúla í Klaksvík.

Studentaskúlin og HF skeiði á Kambsdali, Fiskivinnuskúlin í Vestmanna, og aðrar verkætlanir? Veit ikki hvussu nógvir næmingar samanlagt eru á hesum skúlum, men neyvan er tað líka nógv sum Marknagilsætlanin skal rúma.

# MARKNAGILSDEPILIN: 475 MILLIÓNIR FYRI MARKNAGIL, OG HVAT SO?

Har tosa vit um umleið 1.300 næmingar árliga, so hettar krevur góðar umstøður.

## Útlendsk fyritøka sum skarar framúr?

Eisini er vert at nevna, at tað almenna ikki hevur bygt nakað av týdningi í Tórshavn síðani 1983, tá ið Føroya Handilsskúli varð gjørdur.

Eitt annað, sum upptekur meg rættuliga nógv er, at bert tey bíligastu tilboðini eru komin alment fram.

Eitt sum er í eygafallandi er, at her er serliga ein útlendsk fyritøka sum skarar framúr.

Hvussu ber tað til?

Kann tað hugsast, at lønirnar teir kalkulera við eru Íslendskar?

## Uttan um føroyingar

Eg veit bara eitt: Teir hava fyrr gjørt almenn arbeiðir uttan at okkara, og onnur fakfeløg, eg havi tosað við, hava átt nakran lim á arbeiðsplássinum.

Hettar eiga myndugleikar okkara at kanna fult út, tí um tað er rætt, sum eg meti, ja so er tað einki minni enn kappingaravlagandi ímóti okkara heimligu fyritøkum, sum yvirhalda føroyskar sáttmálar og átti tað, at havt almennan áhuga.

Vit hava í øllum føri - grundaðan mistanka um - at so er. Tað eigur eisini at verða nevnt, at arbeiði av at gera skúlan, í størstan mun eigur at kasta pening (skatt/og annað) av sær til tað Føroyska samfelagið, og tað ger tað ikki/ella í minni mun um útlendingar koma at byggja.









# JANUS B. KAMBAN: UM MARKNAGILSDEPILIN



*Janus B. Kamban*

## Eg vil gera vart við nøkur viðurskifti:

- Orsøkin til, at TG Verk kann undirbjóða føroyskar veitarar, er, at tað íslendska lønarlagið er lægri enn tað føroyska. Eg havi hoyrt, at entreprisan er roknað út eftir einari tímaløn til handverkararnar, sum svarar til 75 DKK og einum tímaprísi fyri handverkararnar, sum svarar til 140 DKK. Ein føroyskur handverkari skal hava minimum 120 DKK, flestu fáa 130-150, og kostar uml. 280-300 DKK um tíman.

## Føroyskar fyritøkur

– Tá ein slík stór verkætlan fer í gongd, verður lítið annað bygt av tí almenna. T.v.s. at tær føroysku fyritøkurnar missa arbeiði og koma í kreppu. Articon og J&K mugu út at reparera stakitt og montera takrennur fyri fólk, og fara sostatt at taka arbeiði frá smærri byggifyritøkum. Tað verður kreppa í byggivinnuni, arbeiðsloysi og fráflyting verður úrslitið.

– Hesar nógvu hundrað milliónirnar, sum kundu skapt arbeiði til føroyskar hendur, fara

# JANUS B. KAMBAN: UM MARKNAGILSDEPILIN

av landinum. Vit fáa ongan skatt inn av lønunum, og kombinerað við tað hækkaða arbeiðsloysið minka vit um skattagrundarlagið hjá landinum við fleiri hundrað milliónum, hesi árini verkætlanin er í gongd.







## Púra ókent í Føroyum

– Frá byrjan er byggiætlanin projekterað á ein hátt, sum er púra ókendur í Føroyum. Tey, sum hava gjørt ætlanina, hava av onkrari orsøk frá byrjan gjørt hana sera torføra fyri føroyskar byggifyritøkur.

Tað er upp til andstøðupolitikarar og fjølmiðlar at gera av, hvørjir spurningar skulu spyrjast í hesum sambandi.

## Mínir spurningar eru hesir:

– Var ætlanin frá byrjan, at entreprisan skuldi fara av landinum?
– Er ongin politiskur vilji til, at almennar føroyskar útbjóðingar skulu skapa arbeiði í Føroyum?
– Tá vit taka hædd fyri teimum mistu skattakrónunum, er so nøkur sparing við at lata útlendingar taka almenn arbeiðir í Føroyum?
– Er búskaparstýringin hjá tí almenna so fragmenterað, at teir ymsu kassarnir arbeiða hvør sær og ongin tekur hædd fyri tí størru myndini, í hesum sambandi tær mistu skattainntøkurnar?

Eg vildi ynskt, at andstøða og fjølmiðlar tóku hetta mál upp.

*Janus B. Kamban*











Ein depil innan skipatænastur

www.mest.fo

At smíðja, umvæla og umbyggja skip og verksmiðjur er okkara avbjóðing.

Men **MEST** er eisini so nógv annað.

**Vit bjóða m.a.**

- Serkøn fólk og vælútgjørdar smiðjur
- Landsins størstu goymslu av eykalutum
- Projekt- og teknistovuarbeiði
- Stórar bedingar og turrdokk
- Leigu av sleipibátum og kranum
- Titringsmátingar (vibratiónsanalysur)



MEST

**MEST**
P.O. Box 65
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel +298 30 11 00
Fax +298 30 11 01
info@mest.fo
www.mest.fo




# SØGAN UM TEKNISKAR SKÚLAR Í FØROYUM

Fyrsti veruligi tekniski skúli í Føroyum byrjaði í Havn í 1885/86. Stigtakari var amtmaðurin Buchwald. Millum næmingarnar á hesum skúla var Djóni Isaksen, Djóni í Geil. Hann gjørdist góður arkitektur; eitt av mætastu verkum hansara er grótbygningurin, sum í dag hýsir umsitingina hjá Býráðnum á Vaglinum

Næsti tekniski skúlin byrjaði í 1908/09, og var tað Magnus Jacobsen (Magnus á Kamarinum), ið fekk henda skúla í lag.

Lærarar vóru Magnus, sum sjálvur hevði tað fakliga undir hond og Jógvan Waagstein, ið hevði fríhanda tekning sum undirvísingargrein. Millum næmingarnar vóru Frits Hansen (Frits í Pætursarstovu), Zacharias Jacobsen (Zacharias hjá Bøkjaranum), Johs. Stephanson, Jákup Øster, Viggo Christiansen, Sofus Rasmusen, og Rasmus Thomsen (Rasmus í Funningsstovu).

## Triðja royndin

Triðja skúlan byrjaðu Steingrim Winther og H.C.W. Tórgarð í 1920. Hesin skúlin helt uppat í 1926.

Nevndu tríggir skúlar vóru allir noyddir at gevast, tí ikki fekst almennur stuðul til rakstrin. Í hesum sambandi er vert at vísa á, hvussu lítið okkara umsiting skilti av hesum týdningarmikla arbeiði. Tá ið Tekniski skúli byrjaði sína undirvísing í 1934, varð Føroya Løgting biðið um at stuðla rakstrinum av skúlanum. Á umsókn skúlans varð svarað, at Føroya Løgting hevði samtykt at veita skúlanum stuðul, kr. 138 og, at hesin stuðul var givin eina ferð “med alla”. Tað vóru greið boð um ikki at søkja aftur eitt annað ár.

Tí betur broytti Føroya Løgting seinni sína støðu.

## Grundarlagið lagt í 1933

Grundarlagið undir núverandi teknisku skúlagongdini varð lagt í 1933, tá Ernst Hansen, lærari á Tvøroyri, byrjaði tekniskan kvøldskúla. Í 1934 byrjaði Havnar Handverksmeistarafelag tekniskan skúla í Havn (hesin var statsgóðkendur í februar árið eftir)

Veturin 1935 varð skúli byrjaður í Klaksvík, og síðani komu skúlar í Vági, Vestmanna og Fuglafirði. Í 1950 varð roynt at seta skúlar á stovn á Skála og Sørvági, men hetta miseydnaðist.







# SØGAN UM TEKNISKAR SKÚLAR Í FØROYUM





## Statsstuðlaðir

Hesir skúlar, stovnaðir í tríatiárunum, gjørdust statsstuðlaðir, og teimum var lív lagað. Allir vóru kvøldskúlar, skúlagongdin var óboðin og frammøtingin var so sum so. Summir av næmingunum høvdu lítlan skúlahug, og teir, ið frægast vóru, arbeiddu ofta yvir.

## Næmingatalið í Havn vaks

Í Havn vaks tó talið av næmingum, og í 1943 bjóðaði Havnar Handverksmeistarafelag til kapping um tekning av húsum til tekniska skúlan. Inn komu 4 uppskot og 2 fingu virðisløn. Sama árið søkti felagið Føroya Løgting um stuðul til byggjan av skúlahúsum, men umsóknin varð ikki játtað.

Í 1943 fór Havnar Handverksmeistarafelag undir at fáa í lag eina føroyska lærlingalóg. Til at savna hesa lóg vórðu valdir Vilhelm Nielsen, formaður felagsins, og Richard Long løgtingsmaður og greinskrivari. Lógaruppskotið varð sent landsnevndini, ið sendi tað til løgtingið, men uppskotið var ikki samtykt fyrr enn í 1954.

Tá hevði nevnda lógaruppskot fingið viðmæli frá danska arbeiðsmálaráðum, Håndværksrådet og Tilsynet med den tekniske undervisning.

## Føroysk Lærlingalóg

Havnar Handverksmeistarafelag hevði nú ávirkað, at fingin var føroysk lærlingalóg, men nógvir vóru teir lærlingar, t.d. av Skálafjørðinum og úr Vágunum, sum ikki høvdu høvi at luttaka í tekniskum skúlagangi, soleiðis sum kravt varð sambært lógini.

## Dagskúli

Felagið skipaði tí fyri, at tekniski skúlin í Havn byrjaði 5 mánaða dagskúla fyri næmingar av bygd, so eisini hesir lærlingarnir kundu lúka tey krøv, ið sett vóru fyri at kunna luttaka í sveinaroynd og loknari læru. Hesin skúli varð byrjaður í November 1956.

## Sjálvboðin skúlagongd

Skúlagongdin var sum áður nevnt sjálvboðin, og frammøting næminganna var eftir at ynskja. Fyri at stimbra hug næminganna fyri skúlanum, var í 1944 - á skúlanum í Havn - byrjað sjálvboðin sveinaroynd. Tiltakið eydnaðist, áhugin vaks, og tá lærlingalógin var sett í gildið, kom ferð á, og skúlin kom í fasta legu.

## Heimastýrislógin

Sambært ,,Heimastýrislógini" var sjálv tann verkliga læran ,,Sermál", men skúlin hevði einans við donsku skúlamyndugleikarnar at gera.

Í Danmark var í 1957 samtykt at miðsavna handverkaraútbúgvingina, kvøldskúlarnir skuldu halda uppat, og undirvísingin skuldi samskipast á størri, væl útgjørdum skúlum - við forskúlum.

## Tilsynet med den tekniske undervisning

,,Tilsynet med den tekniske undervisning" sendi fyrispurning til føroysku teknisku skúlanar, um ikki best var at gera eina tílíka samskipan her eisini, men einki varð gjørt í hesum máli fyribils.

## Skúlin á Tvøroyri sendir fyrispurning

Seinni sendi Tekniski Skúlin á Tvøroyrar fyrispurning til skúlan í Havn, um tað kundi verða møguleiki fyri, at næmingar teirra kundu koma til Havnar og her fáa fakliga undirvísing, hetta er tí, at teir høvdu ikki nóg mikið av næmingum - í hvørjum faki sær - til at teir høvdu ráð til at hava lærarar til fakini sambært tey krøv, ið sett vóru í undirvísingarlógini í 1957. Har var m.a. kravt, at fakliga undirvísingin skuldi fara fram í reinum "fakklassum", undirvístir av faklærdum lærara.

## Inspektørur og statskonsulentur til Føroya

Skúlin í Havn takkaði Tvøroyrar Skúla fyri álitið, og vildi fegin hjálpa teimum við undirvísingini. Um sama mundi kom bræv frá ,,Tilsynet", har teir søgdu, at A.P. Lie, inspektørur, og K. Toftdahl Møller, statskonsulentur, komu til Føroya fyri at kanna um møguleikar vóru fyri eini samskipan av skúlunum á sama hátt, sum teir vóru farnir í holt við í Danmark.

## Samskipa skúlarnar

Úrslitið av hesi kanningarferð varð, at teir hildu, at best var at samskipa skúlarnar. Tá skúlin í Havn var undantikin, var eingin møguleiki at geva undirvísing í "reinum fakklassum", tí ov fáir næmingar vóru á hinum skúlunum í hvørjum faki sær.

## Tekniskt skúlasamtak í Havn

,,Tilsynet med den tekniske undervisning" bað so A.P. Lie og K. Toftdahl Møller samráðast við skúlarnar um at sláa saman í ein meginskúla, tí Havnin var miðstøðupláss í Føroyum, og í Havn vóru fleiri næmingar enn í øllum hinum skúlunum í Føroyum tilsamans.

Aftaná drúgvar samráðingar gingu skúlarnir á Tvøroyri, Vági, Vestmanna og Fuglafirði við til skúlasamtak, meðan skúlin í Klaksvík setti seg ímóti samskipan. Og ikki kann annað sigast enn, at hetta skúlasamtak, ið byrjaði í 1961, hevur roynst væl.

# SJÓNARHORNIÐ: OSKAR EIRIKSON



**Núverandi starv:**
Húsavørður hjá Tórshavnar Býráð

**Aldur:** 51 ár

**Maki:** Margretha Petursdóttir

**Børn:**
Kjartan, 28 ár, Eirikur, 19 ár og Katrin, 18 ár

**Handverksútbúgving:**
Bygningssnikkari, byrjaði 1. okt. 1977

**Tekniskur skúli:** Í Tórshavn

**Útlærdur:** 1 okt. 1981

**Sveinastykkið:**
Skriviborðsmøbil úr Palisander

**Arbeitt sum sveinur hjá:**
Liljukøkur v/Bjarka Jacobsen, Finnboga Olgarsson (Hotel Føroyar o.a.) p/f Høvil, Gundadalshøllin, Falkenberg og Nilsen, Búsetur og Tórshavnar Býráð

**Frítíðarítriv:** Golf, rossamaður

**Besta bók:** Robinson Cruise

**Besti sangur:**
Flag v/Black Birds

**Besti filmur:**
Danse med ulve v/Keven Costner

**Besti sjónleikari:**
Jákup Weihe og Keven Costner

**Er tað okkurt serstakt arbeiði, sum tú minnist væl:**
Skrivstovumøblarnir hjá Nils Juul Arge (Útvarpið), sum eg saman við Nils Debes gjørdu

**Fartelefon:** Motorola



**Hvør heldur tú hevur myndað tín persón mest:**
Nú havi eg ongantíð havt nøkur foreldur, so tað man nokk verða mín góði vinur tey seinastu 25 árini, Poul

**Hevur tú ein ella fleiri søguligar persónar, sum hugtaka teg:**
Winston Churchill

**Hvør er tín størsta fyrimynd:**
Abbi mín Sámal P. Petersen og langabbi Dánjal J. Petersen. Báðir av bestu handverkarum

**Telda:** Dell

**Bilur:** Berlingo Citroen

**Hvat heldur tú um eftirlønarskipanina hjá Havnar Handverkarafelag?**
Sera góð

**Hvat heldur tú um samlagstryggingina hjá Havnar Handverkarafelag?**
Kemur man illa fyri, er hon góð

**Hvat heldur tú er største avbjóðingin hjá einum handverkara í dag:**



*Oskar Eirikson er húsavørður hjá Tórshavnar Býráð*

Teldutøknin, hvørtfall hjá okkum

**Hvat kann gleða teg í gerandisdegnum:**
At tað gongur konuni og børnunum væl, og ikki minst tá Havnar Bóltfelag vinnur

**Hvat kann øsa teg:**
Órættvísi, negativ fólk, og tá HB tapir

HAVNAR BÓLTFELAG 1904

# KETILIN

## ...NÝTIST AT SIGA MEIRA?

JÄSPI-ketilin er kendur í Føroyum. Við mest seldum ketlum á føroyska marknaðinum nýtist ikki at siga meira...

JÄSPI-ketilin fáa tygum hjá Mariu Poulsen.

Ring 312000 og fá eitt óbindandi tilboð!



JÄSPI

**Maria Poulsen**

Tel 312 000 | Fax 315 970 | mp@mp.fo | www.mp.fo





# Nýggjan køk?





TIMBUR HT HANDILIN

## HAVNAR HANDVERKARAFELAG VERÐUR STOVNAÐ

Sunnudagin tann 12. februar 1950 kl. 3 seinnapart var stovningarfundur hildin í "Losjuni".

Fundurin varð settur við 34 monnum, øll stjórnin við formanni Alfred Hofgård, næstformanni Peter Midjord, kassameistara Carl Midjord, skrivara Helgi Øster og Dánjal Tausen var møtt.

Fundurin var lýstur sum stovningarfundur, allir limir úr Handverkaradeildini (hjá Havnar Arbeiðsmannafelag) vóru boðaðir í soljóðandi skrivi:

### Stovningarfundur

Viðtikið varð á aðalfundi 30. januar at handverkarar í Handverkaradeildini ganga saman í sjálvstøðugt felag, ið stovnað verður sunnudagin tann 12. februar kl. 3 seinnapart.

Formaðurin setti fundin, beyð so monnum vælkomið.

Fyrrverandi skrivari Carl Midjord læs úr gerðabókini um síðsta aðalfund Handverkaradeildarinnar.

Síðani greiddi formaðurin frá starvinum hesa seinastu tíðina, vísti aftur á tað, ið fór fram á fundinum í Tórshøll 19. desember 1949, hvar bræv varð sent til Havnar Arbeiðsmannafelag við uppsókn, tosaði um fundarviðtøkurnar frá aðalfundinum um hendan stovningarfund.

Dánjal Tausen var kosin sum fundarstjóri og mælti hann til hóvliga framferð. Harnæst fór stovnanin fram, á tann hátt, at hvør maður fekk ein pappírslepa, hvar á hann setti navn sítt, ið síðan varð flýggjað stjórnini í hendi til varðveitslu.

### Stovnarar

Hesir menn, 32 í tali, mynda í fyrstu syftu felagið sum stovnarar:

Carl Holm Carlsen, Kaj Christiansen, Ólavur Dalsgarð, Valbjørn Dalsgarð, Poul Danielsen, Dánjal Davidsen, Louis Eystberg, Wwnzel Hammer, Meinhard Hansen, Ove M. Hansen, Alfred Hofgård, Carl Midjord, Peter Midjord, Ásmund Mikkelsen, Finn Mortensen, John Mortensen, Ole Mortensen, Sonne Mørkøre, Flemming Niclasen, Eskild Nygård, Pauli Næs, Esmar Olsen, Hans D. Petersen, Holm Petersen, Ernst Reinert, Hallgrím Rein, Dánjal Tausen, Súni Thomsen, Olivar C. Thomsen, Martin Wilhelmsen, Hans C. Wilhelmsen og Helgi Øster.

### Navn

Bert eittans navn varð skotið upp fyri felagið, "Havnar Handverkarafelag", og varð hetta góðtikið við 32 atkvøðum.

### Stjórnarval

Stjórnarvalið fór fram á vanligan hátt.

Til formann vóru uppskotini tvey; Alfred Hofgård fekk 8 atkvøður og Helgi Øster 24 atkvøður.

Til kassameistara Carl Midjord við 30 atkvøðum.

### Stjórnarvalevnini vóru 7 og fall valið:

Hallgrímur Rein: 21 atkvøður
Alfred Hofgård: 15
Peter Midjord: 13
Kaj Christiansen: 10
Wenzel Hammer: 9
Sonne Mørkøre: 6
Dánjal Tausen: 6

Mourits Mortensen, ið ikki var uppskotin fekk 2 atkvøður.

Halgrím Rein, Alfred Hofgård og Petur Midjord vóru soleiðis valdir í stjórn felagsins. Kaj Christiansen og Wenzel Hammer valdir at vera tiltakslimir.

Til roknskapargrannskoðarar vóru valdir: Sigfred Skåle 25 atkvøður og Ólavur Dalsgarð 24 atkvøður.

### Lógarbroyting

Lógarbroytingingaruppskotið, ið lá fyri til "Deildarfundin" - men varð útsett - kom nú fyri, bleiv her lisið upp petti fyri petti, grein um grein. Einkiltar smærri rættingar vóru gjørdar til tess at hon var góðtikin av fundinum við 15 atkvøðum.

Samtykt varð, at lønirnar fyri álitisstørv framvegis vóru tær somu:
Kassameistari 200,- kr. um mánaðin

Formaður 500,- kr. árliga og ókeypis telefon.
Teir tríggir stjórnarlimirnir 400,- kr. um árið hvør.

### Orðaskifti

Fundarstjórin gav nú orðið leyst.

Alfred Hofgård tosaði um sáttmála við Havnar Handverksmeistarafelag, helt hann hetta verða eitt tað fyrsta, ið átti at fáast í lag.

Holm Petersen eggjaði stjórnini til at fara hagfast til verka, og álegði hann henni, nú felagið var veruleiki, mátti einki himpr og skrinkl verða.

Formaðurin mælti limunum at fylkjast um felagið soleiðis at hvør einstakur eftir førimuni veitti stjórn og felagi allan stuðul til fullfíggjan felagsskap.

Fundur slitin kl. 7.10 s.p.

### Fyrrverandi formenn í Havnar Handverkarafelag



**Helgi Øster:**
Føddur 13. oktober 1921.
Helgi Øster var formaður í Havnar Handverkarafelag frá 12. februar 1950 til 28. februar 1958.



**Petur Midjord:**
Føddur 17. september 1922
Petur Midjord var formaður frá 20. februar 1959 til 14. februar 1968.

# BROT ÚR SØGU FELAGSINS



**Carl Holm Carlsen:**
Carl Andreas Holm Carlsen var formaður tvey tíðarskeið. Fyrru ferð frá 28. februar 1958 til 20. februar 1959.

Seinna tíðarskeiðið var frá 14. februar 1968 til 12. februar 1971.



**Andreas Poulsen:**
Andreas Poulsen var formaður tíðarskeiðið 21. februar 1973 til 23. februar 1981.



**Vilhelm Johannesen:**
Vilhelm Meyer Johannesen var formaður frá 12. februar 1971 til 21. februar 1973.



**Alfred Hofgaard:**
Alfred Hofgaard var formaður í Handverkaradeildini, sum var undir Havnar Arbeiðsmannafelag, frá 27. februar 1947 til 12. februar 1950. Alfred var seinni nevndarlimur í Havnar Handverkarafelag í nógv ár.



## 25 ára føðingardagur

Nevnd og kassameistari á 25-ára stovningardegi Havnar Handverkarafelags 12. februar 1975.

*Frá vinstru: Jóannes Dalsgarð kassameistari, Oliver Schrøter Thomsen nevndarlimur, Alfred Hofgaard næstformaður, Andreas Poulsen formaður, Antines Anthoniusser skrivari, Kári Holm Petersen nevndarlimur.*






Vegurin Langi · Postboks 3309
FO-110 Tórshavn · tel 345 000
fax 345 001 · www.balslev.fo
balslev@balslev.fo
DEWALT
BYGMA
BALSLEV
...til handverkaran


Heildarloysnir
frá Articon
sansir.fo
ÁRSINS
VIRKI 2008
ARTICON
Articon P/f · á Hjalla 20 · 188 Hoyvík · Tel. 350 700 · www.articon.fo


SPEKT kann hjálpa tær við
SPEKT


SKAPANDI
www.tsc.fo
Tekniski Skúlin

# Stásilig hølir til ymisk endamál





1. Hølini kunnu útleigast til limir, eins og onnur uttanfyri felagið; talan kann vera um feløg, stovnar ella einstaklingar.

2. Farast skal væl um hølini, og skulu tey latast aftur í sama standi, sum tá ið tey vóru útleigað.

Møguligir skaðar á innbúgv og útbúnað undir útleigan, skal alt fyri eitt fráboðast felagnum, og fult endurgjald fyri umvæling/nýkeyp skal rindast felagnum.

3. Hølini verða leiga út til hesi endamál:

A. Vanlig tiltøk og fundir eftir vanliga arbeiðstíð.
B. Tiltøk, ið eru í vanligari arbeiðstíð og eftir vanliga arbeiðstíð.
C. Tiltøk ið fevna um meira enn ein dag.
D. Framsýningar, eftir nærri avtalu.
E. Merkisdagar (t.d. føðingardag/ fermingardag)
F. Skeiðvirksemi.

4. **Prísir.**
Er talan ikki um limir er kostnaðurin við køki pr. kvøld 2.000,- kr.
Limir leiga hølini til Merkisdagar (inkl. nýtslu av køki) fyri 1.000,- kr.
.
Er talan um onnur tiltøk, sum t.d. fevna um fleiri dagar, verður nærri prísur avtalaður.



# FRÁGREIÐING FRÁ VITJAN AV NORSKA EL & IT FORBUNDINUM



27. august 2012:
9 fólk frá okkara samstarvspartnara í Noreg, EL & IT forbundinum komu á stutta vitjan hjá okkum.

28. august 2012:
Kl 08.30 var morgunmatur í Handverksdeplinum, samstundis sum vit høvdu fund um ymisk aktuel viðurskiftir.

Kl. 10.00 komu 3 mans á fund, hesir starvast allir í Noreg hjá Pam Offshore. Umboðini fyri EL&IT høvdu sett fram ynski um at møta persónum, sum starvaðust í Noreg. Teir svaraðu spurningum frá norðmonnunum.

Kl 11.15
Var farið á vitjan í Vinnuhúsinum, har Marita Rasmussen og Niels Winther tóku ímóti. Tey høvdu gjørt eina framløgu um teirra virksemi. Borðreitt var við smyrjibreyð.

Kl 13.15
Vitjan hjá TST, har Arni Clementsen tók ímóti. Hann hevði eisini eina framløðu um virksemi skúlans, eins og kunna varð um nýggja Marknagilsdepilin. Síðani var fari runt á deildunum.

Kl 14.30
Vitjan hjá Pam Offshore/Mest.
Mouritz Mohr og Bartal Kass tóku ímóti, og eisini teir høvdu eina framløðu um teirra virksemi.
Síðani varð prátað um ymisk viðurskifti í sambandi við teirra virksemi í NO.

Rundvísan var á Skipasmiðjuni, eisini teir fingu møguleika at heilsa uppá bátasmiðin, Kaj Hammer, sum var í gongd við at smíða eitt 6-mannafar.

Eisini fingu teir høvi til at síggja tann nýggja teinæringin, sum Kaj eisini hevur smíðja.

Kl 19.00
Døguri og sosial samvera í Handverksdeplinum.

Samanumtikið ein sera væl eydna vitjan, sum teir vóru sera glaðir fyri.

Ferðalagið fór avstað aftur mikudagin 28. august kl. 14.45.


www.torshavn.fo
Skapandi, mennandi, kveikjandi
TÓRSHAVNAR KOMMUNA


Tú ert handverkarin!
... og vit hava eitt spennandi arbeiðspláss til tín
Vit kunnu bjóða
• spennandi arbeiðsuppgávur
• ein fjølbroyttan og áhugaverdan gerandisdag
• starvsfólkamenning
• trivnað
Hevur hetta tín áhuga, ring so til okkara ella send okkum eitt teldubræv
ELECTRIC
Hoyviksvegur 53 100 Tórshavn Tel 351220 Fax 351230 lm@lm.fo www.lm.fo
LM Electric bjóðar heildarveiting innan el-innlegging, ráðgeving og projektering
· El-innleggingar · Ljós og talvur · EDV-& telefonnet · Neyðstreymsskipanir (no-break og diesel)
· Trygdarskipanir (ABA, ITV, AIA og ADK) · Hvítvøruservice
Døgntænastan svarar altíð á tel 35 12 20


Glarmeistarin v/Poul Guttesen.




Bilasølan




**Betri pensjón tryggjar tær eina munagóða samansparing, sum leggur lunnar undir eina framhaldandi vælferð, tá ið tú fert frá fyri aldur.**

- Vit samanseta pensjón og tryggingar eftir tínum tørvi
- Vit umsita tína pensjón við størsta vinningi fyri eyga
- Umvegis Netpensjón hevur tú fult gjøgnumskygni



Savnar tú tryggingar og pensjón hjá okkum, kanst tú fáa upp til 32% í avsláttri.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Betri pensjón